# Løgreglubilur fekk stóran skaða í ferðsluóhappi

**Sunnumorgun kl 9 var ein løgreglubilur á veg til G! Festivalin úti fyri ferðsluóhappi. Eingi fólk komu til skaða, men løgreglubilurin og ein privatbilur fóru sera illa**



*Politibilurin fór illa í ferðsluóhappinum við Statoil støðina við Saltangará sunnumorgunin*

FERÐSLUÓHAPP
*Heini í Skorini*

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein løgreglubilur kemur út fyri tí, eysturoyingar vóru vitni til sunnumorgunin. Í sambandi við eina yvirháling var samanstoytur millum ein løgreglubil og ein privatbil, og hóast eingin mansskaði var, var talan um stóran materiellan skaða. Løgreglubilurin er ikki staðfestur vrak, men ivasamt er, um hann aftur verður tikin í nýtslu.

Óhappið fór fram við Statoil støðina á Saltangará. Tveir løgreglumenn í løgreglubilinum vóru á veg til stóra G! Festivalin í Gøtu, og tá teir yvirhálaðu ein privatbil, brustu bilarnir báðir fyrst saman, áðrenn løgreglubilurin varð slongdur inn í ein anhengara og eina flaggstong á parkeringsøkinum hjá Statoil. Privatbilurin fekk eisini skaða, tó ikki so álvarsaman sum talan var um hjá politibilinum.

Líkamikið hvør orsøkin var, var talan um ein heldur óvanligan tilburð, við tað at sjálvur politibilurin hesaferð kom illa fyri, men til alla lukku sluppu báðir løgreglumennirnir og einasti persónurin í privatbilinum undan nøkrum stórvegis skaða í ferðsluóhappinum á Saltangará.

**- Ferðin ikki ov høg**

Av løgreglustøðini í Runavík verður sagt, at talan ikki var um ov høga ferð.

- Tá politiið verður boðsent, hava vit altíð skund, men talan var ikki um eina skilaleysa koyring við ov høgari ferð, men heldur um eitt keðiligt óhapp. Vit skuldu yvirhálað bilin frammanfyri, men í eini misskiljing endaði tað, sum tað gjørdi, verður sagt av politistøðini í Runavík.



*Privatbilurin fekk ikki líka stóran skaða sum løgreglubilurin. Til alla lukku var ongin fólkaskaði í óhappinum*

# Politiið úr at gera um vikuskiftið

**Bæði í Eysturoynni, men eisini í Havn, hevði politiið úr at gera í vikuskiftinum. G! Festivalurin í Gøtu er høvuðsorsøkin til mongu lógarbrotini, har bæði álvarsamur harðskapur, stuldur, rúsdrekkakoyring o.a. fóru fram**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Heini í Skorini*

Hóast løgreglan í Eysturoynni hevði fleiri menn á vakt í sambandi við stóra G! Festivalin og trygdartiltøkini kring tiltakið skuldu verið í ordan, gekk alt ikki, sum tað skuldi um vikuskiftið.

Nógv og fjølbroytt lógarbrot voldu politistunum mikið høvuðbrýggj, og í flestu førum var talan um rúsdrekkakoyring. Ikki minni enn níggju tilburðir vóru av hesum slag, og í flestu førum var talan um bilar á veg úr Gøtu eftir tiltakið. Í tveimum av teimum níggju tilburðunum var talan um, at bilarnir vórðu stolnir, og nakrir av ávirkaðu førarunum høvdu ikki koyrikortið.

Nakað av ófriðið var eisini á sjálvum sandinum, m.a. á sjálvum tjaldingarplássinum. Í hesum føri vóru nøkur skuldsett fyri brot á politiviðtøkuni um ikki at akta boð frá myndugleikunum.

**Maður stungin á Kambsdali**

Mest álvarsami tilburður fór tó fram uttanfyri høllina á Kambsdali undir konsertini hjá All That Rain. Eftir at tað var komið til ilnar, var ein knívur á loftið og maður stungin í búkin. Talan var um eina hættisliga støðu hjá manninum, og hann fekk fleiri pentur í búkin. Offrið tykist hava tað gott eftir umstøðunum, men politiið stendur meiri ella minni á berum viðvíkjandi upplýsingum um, hvør nýtti knív og stakk mannin.

Á Saltangará var talan eisini um kostnaðarmiklan stuldur, tá alt brennivínið var horvið á matstovu. Talan var um innbrot men tykist ikki hava beinleiðis samband við sjálvan festivalin.

Av Løgreglustøðini í Runavík verður sagt, at undir sjálvum tiltøkunum gekk sum eftir ánni, men at lógarbrotini í størsta mun fóru fram eftir festivalin. Hóast politistarnir vóru væl mannaðir, var talan um eitt vikuskiftið við nógvum lógarbrotum og skuldsetingum í Eysturoynni.

**Eisini ófriður í Havn**

Hóast eysturoyingar høvdu ábyrgdina av G! Festivalinum, var talan eisini um ymisk lógarbrot í Havn. Tvey brot vóru á sjólógina, og í báðum førum var talan um rúsdrekkasigling. Leygarnáttina var harðskapur framdur móti einum útlendingi í Platform, og tveir bilar vóru stolnir, ein á Traðarvegi í Havn og hin vesturi í Vágunum. Stolni bilurin í Vágunum endaði sum vrak í Vágatunnlinum, tá ávirkaði biltjóvurin rendi inn í tunnilsveggin. Førarin var fluttu á sjúkrahúsið í Havn og slapp sera væl frá óhappinum.

Í morgun fór ein rúsdrekkaávirkaður maður á sjógv við keiøkið í Havn, umframt at 8 gram av hassji vóru funnin á manni umborð á Nørronu í morgun.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Jonhild og Óla Jákup Kruse silvurbrúdleyp

Týsdagin 22. juli hava hjúnini Jonhild og Óla Jákup Kruse á Oyrabakka silvurbrúdleyp. Jonhild er dóttir Olgu og Jógvan Poulsen á Oyrabakka, og Óla Jákup er sonur Turid og Otto Kruse á Eiði. Óla Jákup er skiparalærdur og hevur siglt meginpartin av lívinum, men nú starvast hann á rækjuvirkinum á Oyri. Jonhild hevur starvast á rækjuvirkinum á Oyri í mong ár. Jonhild og Óla Jákup eiga fýra børn: Jógvan, Tórodd, Olga og Marni. Umframt tað eiga tey ommu- og abbabørnini Jónas og Karin. Silvurbrúdleypsdagin halda tey í heiminum leygardagin 26. juli, har øll er vælkomin.

## Dagurin

**22. juli. Maria Magdalena.** Verður nevnd sum ein av teimum kvinnunum, sum vóru í fylgi við Jesusi og verður sett í samband við ymiskar kvinnur, sum vit annars hoyra um í evangelisku frásøgnunum. Var ein av kvinnunum við Jesu grøv, tá ið hann var upprisin. Magdalena merkir *úr bygdini Magdala.*



## Sten Balle 70 ár.

Leygardagin 19. juli fylti Sten Balle í Havn 70 ár. Sten er føddur í Grønlandi og flutti sum tvey ára gamal saman við foreldrum sínum til Danmarkar. Foreldrini vóru Birgithe og Nicolaj Edinger Balle, bæði donsk. Sten vaks upp í Keldby á Møn, har pápin var prestur. Hann er útbúgvin sivilverkfrøðingur og giftist í 1960 við Margretu, vanliga nevnd Diddan, dóttir Dennu og Kjartan Mohr í Havn.

Í 1961 komu tey til Føroya í samband við byggingina av Landssjúkra-húsinum, tá Sten fekk arbeið sum verkfrøðingur hjá byggifelagnum Lamhauge & Waagstein. Seinni í 60-unum bleiv Sten settur sum stjóri á deildini hjá byggifelagnum E. Pihl & Søn í Føroyum. Hann hevur arbeitt hjá hesum felag til 2002, tá hann fór frá fyri aldur. Diddan og Sten búgva í Havn og eiga fýra børn: Kristin, Gitta, Gunvør og Nicolei. Í sambandi við 70 ára føðingardagin eru eini 30 fólk komin úr Danmark, bæði familja og gamlir vinir.


